# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Vit eru í hørðum bardøgum í Afghanistan, og tað kann væl gerast verri, áðrenn tað verður betur*

*David McKiernan, generalur*

# Bíða eftir Umboðsmannatinginum

**Í amerikanska Senatinum var eingin ivi, tá uppskotið um at hjálpa fíggjarmarknaðinum kom til atkvøðugreiðslu**



*Formaðurin í bankanevndini hjá Senatinum, demokraturin Christopher Dodd, greiðir fjølmiðlunum frá atkvøðugreiðsluni*
*Mynd: Polfoto*

74 senatorar svaraðu ja, tá Senatið í nátt atkvøddi um hjálparpakkan, sum skal hjálpa amerikanska fíggjarmarknaðinum burtur úr kreppuni ella í minsta lagi avmarka avleiðingarnar.

25 senatorar søgdu nei, og sum væntað vóru teir flestu úr tí republikanska hópinum. Teirra millum var Elisabeth Dole, sum alla tíðina talaði ímóti uppskotinum. Hon er kona Robert Dole, sum var forsetavalevni í 1996, og sjálv royndi hon at gerast valevni fýra ár seinni.

Tey bæði forsetavalevnini, Barrack Obama og John McCain, vóru komnir til Washington at greiða atkvøðu, og báðir atkvøddu fyri hjálparpakkanum.

Tá Umboðsmannatingið feldi hjálparpakkan mánakvøldið, vóru tað serliga tey republikonsku umboðini, sum atkvøddu ímóti.

Eygleiðarar í Washington siga tað kortini vera merkisvert, at 15 av teimum 25 senatorunum, sum atkvøddu ímóti í nátt, vóru republikanarar. Við øðrum orðum atkvøddu ein fimtapartur av demokratunum og ímóti og ein triðingur av republikanarunum ímóti.

Spurningurin er so, hvat Umboðsmannatingið fer at siga, tá tað skal taka støðu til hjálparpakkan í morgin. Eygleiðarar siga, at innihaldið í pakkanum er broytt síðani viðgerðina har seinast, men at spurningurin er, hvussu nógvar atkvøður tað kann flyta.

## Fann klæðini hjá horvnum ævintýrara



*Steve Fossett hvarv á flogferð í fjør*
*Mynd: Polfoto*

Fyri einum ári síðani hvarv amerikanski ævintýrarin Steve Fossett. Nú eru klæðir hansara funnin

Ein maður, sum var farin at spáka í einum runnalendi har norðuri í Kalifornia, hevur funnið klæðir og ymsar lutir, sum eftir øllum at døma stava frá ævintýraranum og ríkmanninum Steve Fossett, sigur CNN.

Steve Fossett hvarv á einari flogferð har vesturi í USA fyri einum ári síðani. Sambært løgregluni í Manmoth Lake er lítil ivi um, at klæðini og lutirnir, sum gongumaðurin fann, eru frá Steve Fossett.

Tann 63 ára gamli amerikanarin var best kendur fyri síni mongu met í luftini. Millum annað var hann tann fyrsti, sum fleyg rundan um jørðina í ballón. Tað metið setti hann í 2002.

# Finsku myndugleikarnir herða vápnalógina

**Tvey skúlahópdráp innan fyri eitt ár hava fingið finsku politikararnar at endurskoða landsins lagaligu vápnalóg, sum nú verður herd**

Í gjár var Anne Holmlund, innanríkisráðhari, í bygdini Kauhajoki og vitjaði vinnuskúlan, har ein ungur maður beindi fyri níggju næmingum og einum lærara tann 23. septembur, áðrenn hann beindi fyri sær sjálvum.

Undir vitjanini boðaði hon frá, at myndugleikarnir eru í ferð við at endurskoða vápnalógina, og at ætlanin er at leggja broytingaruppskot fyri Ríkisdagin til várs. Hon vildi ikki siga so nógv um uppskotið, men segði tó, at verða broytingarnar samtyktar, verður finska vápnalógin strangari enn ES-reglurnar á hesum øki. Finskir fjølmiðlar siga seg hava skilt, at stjórnin ætlar at gera tað truplari hjá fólki at keypa vápn, og at fólk skulu vera í einum skjótifelag í minst eitt ár, áðrenn tey kunnu fáa vápnaloyvi.

Finska kriminalløgreglan vil ikki almannakunngera nøvnini á teimum, sum doyðu í hópdrápinum í Kauhajoki, ella hvar tey búðu. Løgreglan hevur bara upplýst, at tey vóru fødd millum 1957 og 1988, og at tey flestu vóru fyrst í 20'árunum.



*Fólk settu brennandi kertuljós uttan fyri skúlan í Kauhajoki*
*Mynd: Polfoto*

## STUTT SAGT

### Gomul ætt fær uppreisn

Hægstirættur í Russlandi hevur tikið ta avgerð, at tann seinasti russiski keisarin, Nikolaj II, og húski hansara vóru offur fyri politiskum ágangi, og at tey skulu fáa uppreisn og heiður. Avgerðin er tikin, eftir at skyldfólk hjá keisarahúskinum í mong ár hava stríðst fyri at fáa ein tílíkan úrskurð.

Nikolaj II, kona hansara Alexandra, teirra fimm børn, lívlækni keisarans og fleiri av teirra tænastufólkum vórðu skotin í býnum Jekaterinenburg í russiska uppreistrinum í juli í 1918.

Í novembur í fjør segði ein russiskur undirrættur, at talan var um vanlig morð, sum ikki kundu tengjast at politiskum rembingum. Men hægstirættur kemur til eina heilt aðra niðurstøðu og sigur, at drápini í Jekaterinenburg vóru beinleiðis avleiðing av tí politiska ófriðinum í Russlandi tá.

Nikolaj keisari var av Romanov-ættini, og hendan ættin hevur fingið eitt slag av einari endurreisn, síðani Sovjetsamveldið datt sundur.

### Ritt missir undirtøku

Tað vakti ans, tá Ritt Bjerregaard gjørdi av at stilla upp til yvirborgarstjórastarvið í Keypmannahavn fyri trimum árum síðani, og tað var ikki minst hennara navn, sum gjørdi, at Sosialdemokratarnir fingu 38 prosent av atkvøðunum á kommunuvalinum tá.

Men nú vísir ein kanning hjá Gallup, at yvirborgarstjórin er ikki so væl umtókt longur, og at hon skal als ikki kenna seg trygga, tá val verður aftur næsta ár. Tí sambært kanningini eru tað bara 23 prosent av teimum spurdu í Keypmannahavn, sum ætla sær at velja Sosialdemokratarnar á næsta kommunuvali.

Sosialistiski Fólkaflokkurin hevur havt sera stóra framgongd í teimum kanningum, sum hava snúð seg um fólkatingsval, men Gallup-kanningin vísir, at flokkurin er eisini mentur sera nógv í Keypmannahavn. Í 2005 fekk hann 11 prosent har. Í dag hevði hann fingið 26 prosent.